

# Føroya Kærustovnur

## Ársfrágreiðing
## 2012

Ársfrágreiðingin 2012 hjá Føroya Kærustovni
Umbróting og teknindi: www.C4designit.com
Liðugtgerð: www.Valeo.dk
Prent: www.Estra.fo

# Føroya Kærustovnur

## Ársfrágreiðing
## 2012

Innihaldsyvirlit


1. Inngangur . . . . . 5
2. Uppgávan hjá Kærustovninum . . . . . 6
3. Starvsfólk . . . . . 7
4. Fíggjarviðurskifti . . . . . 7
5. Virksemið í 2012 . . . . . 8
5.1. Innkomin mál . . . . . 8
5.2. Avgreidd mál . . . . . 9
5.3. Viðgerðartíðin . . . . . 10
5.4. Viðmerkingar og niðurstøða um virksemið í 2012 . . . . . 11
6. Kærunevndin í almanna- og heilsumálum . . . . . 13
7. Skatta- og avgjaldskærunevndin . . . . . 25
8. Kærunevndin hjá Studna . . . . . 33
9. Kærunevndin í lendismálum . . . . . 37
10. Vinnukærunevndin . . . . . 43
11. Psykiatriska sjúklingakærunevndin . . . . . 51
12. Skuldarumskipanarnevndin . . . . . 55



Føroya Kærustovnur | Undir Hornabakka | Postsmoga 45 | 110 Tórshavn
Telefon 32 05 85 | Telefax 32 05 90 | www.kaerustovnur.fo



# 1. Inngangur

Í hesum bóklingi eru frágreiðingar um virksemi í 2012 hjá teimum nevndum, sum Føroya Kærustovnur varðar av.

Við at gera eina samlaða frágreiðing um alt virksemið og samstundis hava frágreiðing um hvørja nevnd sær, ber til hjá einum og hvørjum at kunna seg um alt virksemið hjá stovninum ella bara at kunna seg við tað økið, sum viðkomandi er áhugaður í.

## 2. Uppgávan hjá Kærustovninum

Kjarnuuppgávan hjá Føroya Kærustovni er at vera skrivstova hjá kærunevndum, sum viðgera avgerðir hjá almennum myndugleikum.

Fyri tað fyrsta er tað fyrireikingin av málunum til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Skatta- og avgjaldskærunevndina, Kærunevndina hjá Studna, Kærunevndina í lendismálum, Vinnukærunevndina og Psykiatrisku sjúklingakærunevndina, sum stovnurin tekur sær av.

Kærustovnurin tekur sær av skrivstovuvirkseminum hjá nevndunum. Stovnurin móttekur kærurnar, skrásetir tær, sendir tær til ummælis og hoyringar hjá avvarðandi myndugleikum og møguligum triðu pørtum. Tá málið er fult upplýst, verður løgfrøðiligt upprit við tilmæli til niðurstøðu gjørt, og verður hetta saman við skjalatilfarinum í málinum sent nevndarlimunum. Innkallað verður til fundar, og tá kærunevndin hevur tikið avgerð, avgreiðir Kærustovnurin avgerðina til kærara og avvarðandi myndugleika.

Avgerðirnar hjá kærunevndunum verða síðani gjørdar navnleysar og lagdar út á avgerðarsavn á heimasíðu okkara. Eisini tekur stovnurin sær av samsýningini hjá nevndunum og av goymsluni av málunum hjá nevndunum.

Eisini upplýsir og fyrireikar Kærustovnurin mál um skuldarumskipan til Skuldarumskipanarnevndina at taka støðu í. Hendan nevnd er ikki ein kærunevnd, men tekur nevndin beinleiðis støðu til umsóknirnar.

Arbeiðið fyri Fjølmiðlanevndina hevur verið avmarkað til part av skrivstovuvirkseminum hjá nevndini tvs. skráseting av kærum, innheintan av upplýsingum, innkalling til fundar o.s.fr. Frá 1. februar 2013 hevur Kærustovnurin alt skrivstovuhaldið hjá nevndini og fer tí framyvir eisini at gera løgfrøðiligt upprit til hesa nevnd. Vart skal gerast við, at frágreiðing fyri Fjølmiðlanevndina er ikki at finna í hesum bóklingi.



## 3. Starvsfólk

Starvsfólkatalið á stovninum er á leið átta fulltíðarstørv. Starvssamansetingin fevnir um 1 stjóra, 3,3 løgfrøðingar, deildarleiðara, 1¾ skrivstovufólk og ein skrivstovunæming.

## 4. Fíggjarviðurskifti

Játtanin til stovnin í 2012 var kr. 5.175.000. Afturat hesum hevur stovnurin fingið kr. 75.000 frá Innlendismálaráðnum til samsýning og skrivstovuarbeiði í samband við Fjølmiðlanevndina. Harumframt er rindað kr. 4.000 í gjaldi fyri kæruviðgerð í samband við Vinnukærunevndina í 2012. Nevndirnar verða samsýntar av játtanini hjá Kærustovninum.

# 5. Virksemið í 2012

## 5.1. Innkomin mál




Í 2012 móttók Kærustovnurin 297 nýggj mál. Hetta eru færri enn árini frammanundan, 31 færri enn í 2011, tá 328 mál komu inn og 80 færri enn í 2010, tá 377 mál komu inn.

Men tað er ikki á øllum økjum, at talið av innkomnum málum er lægri enn undanfarna ár. Nevnast kann, at kærutalið til Psykiatrisku Sjúklingakærunevndina og til Kærunevndina hjá Studna er tvífalt talið av kærum árið frammanundan. Somuleiðis er talið av innkomnum málum til Skuldarumskipa-narnevndina og Fjølmiðlanevndina hægri í 2012 enn árið frammanundan.

Men tá kærutalið bæði til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum og talið av innkomnum málum til Skatta- og avgjaldskærunevndina er væl lægri í 2012 enn undanfarnu bæði árini, sæst hetta beinanvegin aftur í samlaða innkomna talinum av málum. Ein lutfalsliga stór hækking ella minking í talinum av innkomnum málum hjá hinum nevndunum sæst ikki í sama mun aftur í samlaða talinum av innkomnum málum.

## 5.2. Avgreidd mál




Avgreidd eru 379 mál í 2012. Hetta eru 66 fleiri enn í 2011, tá 313 mál vórðu avgreidd og 117 færri enn í 2010, tá 496 mál vórðu avgreidd.

Avgreidda talið av málum er soleiðis rættiliga høgt hetta árið, tó at tað ikki er eins høgt og í 2009 og 2010, sum eisini vóru tvey ár við serliga nógvum avgreiddum málum, partvíst vegna nógvu málini um meirvirðisgjald av skrásetingargjaldi.

Nakað sama tal av málum er avgreitt í 2012 hjá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum sum árið frammanundan. Tað sama kann sigast um Vinnukærunevndina og Kærunevndina í lendismálum. Skatta- og avgjaldskærunevndin avgreiddi nakað fleiri mál í 2012 enn árið frammanundan, og talið av avgreiddum málum hjá Skuldarumskipanarnevndini er í 2012 aftur á einum meira vanligum støði eftir eitt ár við serliga lágum tali av innkomnum og avgreiddum málum.

Vert er annars at leggja til merkis, at bæði Psykiatriska Sjúklingakærunevndin og Fjølmiðlanevndin hava avgreitt serliga nógv mál hetta árið. Talan er um meira enn tvífalt talið av málum í mun til avgreiðsluna hjá hesum nevndum bæði undanfarnu árini.

## 5.3. Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin er ymisk frá nevnd til nevnd og liggur í 2012 frá 10 døgum fyri Psykiatrisku Sjúklingakærunevndina til 8½ mánaðir fyri Skuldarumskipanarnevndina.

Kærustovnurin strembar altíð eftir at stytta um viðgerðartíðina á øllum økjum. Men tað er greitt, at ein miðal viðgerðartíð fyri eitt øki kann vera longri enn fyri annað øki og tó vera nøktandi, tí tað er ymiskt, hvussu langa tíð tað tekur at upplýsa, viðgera og fyrireika málini innan ymsu økini.

Miðal viðgerðartíðin hjá Skuldarumskipanarnevndini er tann sama í 2012 sum í 2011, og miðal viðgerðartíðin hjá Kærunevndini í lendismálum er longd við einum ½ mánaði í 2012 í mun til 2011. Hjá øllum hinum nevndunum er miðal viðgerðartíðin stytt í 2012 í mun til miðal viðgerðartíðina í 2011.

Serliga skal viðmerkjast, at miðal viðgerðartíðin hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini, sum var knappar 9 mánaðir í 2011, er komin niður á góðar 5 mánaðir í 2012. Miðal viðgerðartíðin á hesum øki var serliga long í 2011, men er nú komin niður á eitt nøktandi støði aftur.

Miðal viðgerðartíðin fyri Skuldarumskipanarnevndina er eins og í 2011 8½ mánaðir, og verður hetta mett at vera ein í so long viðgerðartíð. Roynt hevur verið at stytta um viðgerðartíðina á hesum øki, men tað hevur ikki eydnast í 2012 og ivaleyst má ásannast, at tað er trupult at stytta um viðgerðartíðina á hesum øki.

Annars verður mett, at miðal viðgerðartíðirnar á flestu økjum mugu sigast at vera nøktandi hetta árið.



## 5.4. Viðmerkingar og niðurstøða um virksemið í 2012

Staðfestast má, at samlaða talið av innkomnum málum hetta árið er lægri enn undanfarnu trý árini. Talið av avgreiddum málum er hinvegin høgt og eisini hægri enn undanfarna ár.

Miðal viðgerðartíðirnar eru lækkaðar á flestu økjum í mun til undanfarna ár og mugu metast at vera á einum nøktandi støði á flestu, tó ikki á øllum økjum.

Ein avgerandi hending, sum eisini hevur ávirkað okkara arbeiði í 2012 er, at avgerðarsavn okkara reyk niður beint eftir summarfrítíðina. Eftir øllum at døma var talan um eitt hackaraálop, sum oyðilegði savnið. Í savninum ber til at síggja niðurstøðurnar hjá kærunevndunum í navnleysum líki. Vit meta hetta savn vera týdningarmikið, ikki bara fyri okkara arbeiði, men eisini fyri myndugleikar og borgarar, sum har kunnu síggja, hvørjar niðurstøður, nevndirnar eru komnar til, og tí varð neyðugt at fáa savnið at virka aftur sum skjótast.

Tíbetur høvdu vit avgerðirnar liggjandi navnleysar í okkara skipan, so tað var ikki neyðugt at gera alt arbeiðið av nýggjum. Men í gomlu skipanini vóru fleiri avgerðir av sama slagi, og nakrar vóru ikki aktuellar longur, tí lóggávan var broytt. Avgjørt varð tí beinanvegin ikki at leggja allar avgerðir út aftur, men at nýta høvi til at gjøgnumganga avgerðirnar og leggja tær út, sum vórðu mettar at vera av týdningi. Hetta arbeiðið tók nakað longri tíð, enn vit høvdu væntað, men nú er avgerðarsavnið so gott sum komið upp á pláss.

Í somu atløgu fingu vit nýggja heimasíðu, sum tøkniliga er meira tíðarhóskandi og tryggari og eisini lættari at umsita enn tann gamla.



Anja Hovgaard
stjóri

# 6. Kærunevndin í almanna- og heilsumálum

## Nevndin

Í Kærunevndini í almanna- og heilsumálum sita:
- Sigmund Poulsen, løgfrøðingur og formaður
- Annika Olsen, lækni,
- Karin Kjølbro, sosialráðgevi

## Viðgerðarøkið

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum viðger kærur um:
- Avgerðir hjá Almannaverkinum
- Avgerðir hjá Nærverkinum (Heimarøktin, Serforsorgin og Stuðulsfólkaskipanin fyri børn) eftir forsorgarlógini
- Avgerðir hjá Sjúkrahúsverkinum, sum ikki eru um heilsufakligt virksemi
- Avgerðir hjá kommunustýrum um barna- og ungdómstannrøkt
- Avgerðir eftir barnaverndarlógini, sum ikki kunnu kærast til høvuðsbarnaverndarnevndina
- Avgerðir eftir lóg um eldrarøkt á Sandoynni
- Avgerðir eftir lóg um Heilsutrygd

## Móttikin mál

Í 2012 komu 139 nýggjar kærur til Kærunevndina í Almanna- og heilsumálum. Hetta eru væl færri kærur enn bæði undanfarnu árini, tá inn komu ávikavist 164 og 204 kærur. Talið er eisini nógv lægri enn miðaltalið av kærum til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum seinastu 3 árini, sum hevur verið 184. Innkomna talið av kærum hetta árið er á støði við árini 2007 og 2008.

Býtið av innkomnum kærum er í høvuðsheitinum líkt býtinum í 2011. Soleiðis eru flestu kærurnar um avgerðir eftir forsorgarlógini. Næstflestar í tali eru kærur um tillutan og hækkan av fyritíðar-pensjón. Hesum á baki kemur bólkurin, sum vit kalla fyritíðar- og fólkapensjónsmál, sum umframt at fevna um persónligt ískoyti, afturgjaldskrøv og aðrar avgerðir eftir almannapensjónslógini, eisini fevnir um gjald fyri uppihald á stovni og samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima.

Kærurnar eftir sjúkrahúslógini vóru 12 í tali í 2012 og soleiðis á sama støði sum í 2011, tá 11 kærur vórðu móttiknar. Í 2010 vóru serliga nógvar kærur á hesum øki, tá 32 kærur vórðu móttiknar.




| | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|
| • Forsorgarlógin | 74 | 56 | 52 |
| • Fyritíðar- og fólkapensjónsmál, ískoyti, afturgjaldskrøv v.m. | 24 | 26 | 14 |
| • Fyritíðarpensjónsmál, tillutan, hækkan | 36 | 35 | 36 |
| • Barnaverndarlógin | | 2 | 2 |
| • Barnagjaldslógin | 6 | 4 | 2 |
| • Dagpeningalógin | 12 | 14 | 11 |
| • Nærverkið | 6 | 6 | 3 |
| • Sjúkrahúsverkið | 32 | 11 | 12 |
| • Heilsutrygd | 3 | 1 | 2 |
| • Dagstovnalógin | 7 | 5 | 2 |
| • Lóg um barnatannrøkt | 1 | | |
| • Innlit | 1 | | |
| • Stuðul til uppihaldspening | 2 | 5 | 3 |
| **Í alt** | **204** | **165** | **139** |

## Avgreidd mál

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum hevði 12 fundir í 2012 og avgreiddi 164 mál. Talið er á sama støði sum í 2011, tá 167 mál vórðu avgreidd. Talið er væl lægri enn í 2010, men tað árið var talið bæði av innkomnum og avgreiddum kærum hjá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum so høgt sum ongantíð áður. Avgreidda talið av kærum hetta árið er í hægra endanum.




Tey flestu avgreiddu málini eru eftir forsorgarlógini. Næst í tali eru mál um tillutan og hækkan av fyritíðarpensjón og fyritíðar- og fólkapensjónsmál um ískoyti v.m. Næst eftir hesum eru dagpeningamálini og síðan kærumál eftir sjúkrahúslógini.

| | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|
| • Forsorgarlógin | 105 | 56 | 66 |
| • Fyritíðar- og fólkapensjónsmál, ískoyti, afturgjaldskrøv v.m. | 26 | 18 | 28 |
| • Fyritíðarpensjónsmál, tillutan, hækkan v.m. | 45 | 42 | 28 |
| • Barnaverndarlógin | | | 2 |
| • Barnagjaldslógin | 6 | 6 | 2 |
| • Dagpeningalógin | 15 | 15 | 15 |
| • Nærverkið | 10 | 3 | 5 |
| • Sjúkrahúsverkið | 29 | 18 | 9 |
| • Heilsutrygd | 2 | 1 | 1 |
| • Dagstovnalógin | 6 | 5 | 3 |
| • Lóg um barnatannrøkt | 1 | | |
| • Innlit | 1 | | |
| • Stuðul til uppihaldspening | | 3 | 5 |
| **Í alt** | **246** | **167** | **164** |

## Avgreiðslan




Av teimum 164 avgreiddu málunum, var býtið millum myndugleikarnar soleiðis, at Almannaverkið átti 144 mál, Sjúkrahúsverkið 9 mál, Nærverkið 5 mál, kommunurnar 5 mál og Heilsutrygd 1 mál.

## Almannaverkið

Tey 144 málini hjá Almannaverkinum vórðu avgreidd soleiðis:



| | 2010 | | 2011 | | 2012 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| • Staðfest | 94 | 54% | 74 | 59% | 102 | 74% |
| • Broytt | 15 | 9% | 10 | 8% | 8 | 6% |
| • Heimvíst | 17 | 10% | 16 | 13% | 9 | 7% |
| • Burturfallin | 47 | 27% | 26 | 20% | 18 | 13% |
| • Avvíst | 1 | | 2 | | | |
| • Kærufreist | 23 | | 8 | | 7 | |
| • Uppafturtøka | 1 | | 3 | | | |
| • Steðgandi virknaður | | | 1 | | | |
| **Í alt** | **198** | | **140** | | **144** | |

N.B. Í uppgerðini er í mun til % sæð burtur frá avvístum málum, málum um kærufreist, málum um uppafturtøku og málum um steðgandi virknað. Fyri 2012 er % tí roknað út frá 137 málum.




Verður alt økið hjá Almannaverkinum tikið undir einum sæst, at prosentparturin av avgerðum hjá Almannaverkinum, sum vórðu staðfestar í 2012, er hækkaður munandi í mun til árið frammanundan, og er hetta árið 74%. Viðmerkjast skal í hesum sambandi, at prosentparturin av avgerðum, sum vórðu staðfestar var serliga lágur árini 2011 og 2010, ávikavist 59% og 54%. Árini 2007-2009 lá prosentparturin av avgerðum, sum vórðu staðfestar, millum 66% og 68%.

Prosentparturin av avgerðum hjá Almannaverkinum, sum eru broyttar, er lækkaður í mun til undanfarna árið og er í 2012 6%. Árini frammanundan var prosentparturin av avgerðum, sum vórðu broyttar ávikavist 8% í 2011 og 9% í 2010.

Parturin av heimvístum málum er lækkaður í mun til undanfarnu árini og er 7 % í 2012. Í 2011 var parturin av heimvístum málum 13% og í 2010 10%.

Parturin av málum, sum fullu burtur, áðrenn Kærunevndin hevði tikið støðu til kæruna, er lækkaður í 2012 í mun til undanfarna árið, og var hetta árið 13%. Í 2011 var parturin av burturfalnum málum 20% og í 2010 27%.

Kærur, sum falla burtur, eru í høvuðsheitunum kærur, sum verða tiknar aftur, tí Almannaverkið í samband við kæruviðgerðina hevur endurskoðað málið og er komið til annað úrslit t.v.s. broytt ta upprunaligu avgerðina, sum varð kærd. Kærustovnurin sær tað sum eina positiva gongd, at Almannaverkið leggur seg eftir sjálvt at endurskoða sínar avgerðir, tá tær eru kærdar, m.a. tí Almannaverkið á hendan hátt eisini skjótari tillagar avgerðir sínar í mun til nýggjar avgerðir frá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum.

Verða burturfalnu málini eisini roknaði við í positiva partin hjá Almannaverkinum, so verður hesin parturin 87% í 2012, sum er nakað væl hægri enn í 2011, tá hetta talið var 79%. Til samanberingar kann nevnast, at hetta talið í 2010 var 81%.

Málini, sum kunnu roknast í positiva partin hjá Almannaverkinum, eru soleiðis fleiri í 2012 enn seinastu árini. Sigast má eisini, at tað er positivt, at tað er talið av staðfestingum, sum er hækkað heldur enn talið av burturfalnum kærum, tí tá talan er um staðfestar kærur merkir tað, at borgarin beinanvegin fekk røttu avgerðina frá Almannaverkinum.

Avgerðirnar, sum verða broyttar ella heimvístar, mynda tey mál, sum ikki eru nøktandi viðgjørd. Hetta er fyri alt økið undir einum tilsamans 13% av málunum í 2012. Til samanberingar kann sigast, at í 2011 og 2010 vórðu ávikavist 21% og 19% av kærumálunum hjá Almannaverkinum broytt ella heimvíst.

## Forsorgarmál

| | 2010 | | 2011 | | 2012 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| • Staðfest | 57 | 66% | 31 | 65% | 48 | 74% |
| • Broytt | 2 | 2% | 5 | 10% | 6 | 9% |
| • Heimvíst | 10 | 12% | 7 | 15% | 3 | 5% |
| • Burturfallin | 17 | 20% | 5 | 10% | 8 | 12% |
| • Avvíst | 1 | | 1 | | | |
| • Kærufreist | 18 | | 4 | | 2 | |
| • Uppafturtøka | | | 2 | | | |
| • Steðgandi virknaður | | | 1 | | | |
| **Í alt** | **105** | | **56** | | **67** | |

Prosentparturin av forsorgarmálum, sum eru staðfest, er hægri í 2012 enn bæði undanfarnu árini. Samlaða talið av staðfestum og burturfalnum málum er eisini hægri í 2012 enn í 2011, men er á sama støði sum í 2010. Prosentparturin av avgerðum, sum eru broyttar, er á nakað sama støði sum í 2011, men hægri enn í 2010, meðan parturin av heimvístum málum er hægri enn í 2011, men lægri enn 2009.

Forsorgarlógin fevnir um eitt ógvuliga breitt øki, og hetta vísa avgreiddu málini eisini. Tað er ikki nakað ávíst øki innan forsorgarlógina, har tað eru serliga nógv mál hetta árið, men snúgva málini seg um bæði endurbúgving, uppihaldshjálp, stakútreiðslur, hjálparráð og endurgjald fyri inntøkumiss. Soleiðis er ikki nakað serligt at viðmerkja fyri hesa málini í 2012.

## Fyritíðar- og fólkapensjón (ískoyti, afturgjaldskrøv v.m.)

| | 2010 | | 2011 | | 2012 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| • Staðfest | 14 | 54% | 8 | 47% | 24 | 86,0% |
| • Broytt | 2 | 8% | 2 | 12% | 1 | 3,5% |
| • Heimvíst | 1 | 4% | 2 | 12% | 2 | 7,0% |
| • Burturfallin | 9 | 34% | 5 | 29% | 1 | 3,5% |
| • Kærufreist | | | 1 | | | |
| **Í alt** | **26** | | **18** | | **28** | |

Parturin av hesum bólki av málum, sum eru staðfest, er munandi vaksin í mun til árini frammanundan og er heili 86% í 2012. Parturin, sum er burturfallin, er hinvegin fallin munandi í mun til bæði undanfarnu árini. Parturin av málum, sum antin eru broytt ella heimvíst, er væl lægri í 2012 enn í 2011, men á nakað sama støði sum í 2010.

Nakrar kærur, sum ganga aftur, eru kærur um persónligt ískoyti t.d. til tannviðgerð ella brillur. Í hesum málum er tað mangan soleiðis, at Almannaverkið hevur gjørt tørvsmeting, sum vísir avlop og tí grundar avgerðina við, at talan er ikki um fíggjarlig viðurskifti, sum kunnu metast sum serliga trupul. Hinvegin er tað ofta soleiðis, at kærarin metir seg ikki hava nakað avlop og tí ikki sær seg føran fyri at rinda útreiðsluna.

Ásett er í kunngerð, hvussu metingin av, um talan er um serliga trupul kor, skal gerast, herundir hvussu tørvsmetingin skal gerast. So hóast kærarar ikki meta seg hava ráð at rinda fyri ávísu útreiðsluna, so er ofta ikki talan um serliga trupul kor sambært kunngerðini og tí ber ikki til at fáa ískoyti.

Nakrar kærur hava verið um ansingarsamsýning hetta árið, og vórðu tær allar staðfestar, tí tann ansaði varð ikki mettur at hava tørv á støðugari røkt og hjáveru, og tá kann ansingarsamsýning ikki játtast.

## Fyritíðarpensjón (tillutan, hækkan v.m.)

| | 2010 | | 2011 | | 2012 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| • Avgerð staðfest | 14 | 34% | 24 | 58% | 16 | 64% |
| • Broytt | 6 | 15% | 2 | 5% | 1 | 4% |
| • Heimvíst | 6 | 15% | 6 | 15% | 3 | 12% |
| • Burturfallin | 15 | 36% | 9 | 22% | 5 | 20% |
| • Kærufreist | 3 | | 1 | | 3 | |
| • Uppafturtøka | 1 | | | | | |
| **Í alt** | **45** | | **42** | | **28** | |

Hetta árið vórðu 64% av avgerðunum staðfestar. Hetta er ein hækkan í mun til tey bæði undanfarnu árini. Hinvegin er talið av burturfalnum málum lækkað í mun til 2011 og 2010, men samanlagt er parturin av málum, sum antin eru staðfest ella burturfallin, hægri enn bæði undanfarnu árini.

Í 10 av avgerðunum var talan um, at kærari hevði fingið noktað fyritíðarpensjón, í 6 av málunum varð kært um, at viðkomandi bert hevði fingið lægstu fyritíðarpensjón, og í 12 av málunum var støðan tann, at kærarin hevði fingið miðal fyritíðarpensjón, men metti seg hava rætt til hægstu.

## Dagpeningur

| | 2010 | | 2011 | | 2012 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| • Staðfest | 8 | 53% | 8 | 61% | 9 | 64% |
| • Broytt | 2 | 13% | 1 | 8% | | |
| • Heimvíst | 4 | 27% | | | 1 | 7% |
| • Burturfallin | 1 | 7% | 4 | 31% | 4 | 29% |
| • Kærufreist | | | 2 | | 1 | |
| **Í alt** | **15** | | **15** | | **15** | |

Parturin av dagpeningamálunum í 2012, sum vórðu staðfest, er hækkaður í mun til tey bæði undanfarnu árini. Parturin av málum, sum eru burturfallin, er á nakað sama støði sum í 2011, men nakað væl hægri enn í 2010. Parturin av málum, sum eru broytt ella heimvíst, er lækkaður nógv í mun til 2010. Dagpeningamálini eru tó so fá í tali, so fyrivarni má takast fyri, at heilt fáar avgerðir hava lutvíst stóra ávirkan á prosentbýtið.

Innihaldsliga er ikki nakað nýtt í dagpeningamálunum hetta árið, men snúgva tey seg m.a. um, at søkt er ov seint um dagpening og um dagpening millum túrar.

## Barnagjaldslógin

| | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|
| • Staðfest | 1 | 3 | 2 |
| • Broytt | 2 | | |
| • Burturfallin | 1 | 2 | |
| • Kærufreist | 2 | | |
| • Uppafturtøka | | 1 | |
| **Í alt** | **6** | **6** | **2** |

Her verður prosentparturin ikki roknaður út, tí mett verður, at talan er um alt ov fáar avgerðir til, at tað gevur nakra meining at tosa um prosent.

Málini snúðu seg um forskotsvísa rindan av barnapeningi og serligt barnaískoyti.

## Stuðul til uppihaldspening

| | 2011 | 2012 |
|---|---|---|
| • Staðfest | | 3 |
| • Burturfallin | 1 | |
| • Heimvíst | 1 | |
| • Kærufreist | 1 | 1 |
| **Í alt** | **3** | **4** |

Innihaldsliga snúðu hesi mál seg um umsóknir, sum vórðu noktaðar, tí tær vóru innkomnar, eftir at freistin at søkja um stuðul var farin, og um avmarkingina av stuðlinum, har stuðul verður veittur av goldnu upphæddina, sum fer upp um vanliga árliga gjaldið fyri eitt barn. Rindar persónur bert vanliga árliga gjaldið fyri eitt barn, verður stuðul ikki latin.

## Nærverk

| | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|
| • Staðfest | 8 | 2 | 2 |
| • Burturfallin | | | 1 |
| • Kærufreist | 2 | | |
| • Avvíst | | 1 | |
| • Heimvíst | | | 1 |
| • Broytt | | | 1 |
| **Í alt** | **10** | **3** | **5** |

Kærunevndin tók hetta árið støðu í 5 málum um avgerðir hjá Nærverk. 4 av avgreiddu málunum snúðu seg um ymiskt í samband við stuðlar eftir stuðulsfólkaskipanini, meðan ein snúði seg um gjald fyri heimahjálp.

Í málinum um egingjald fyri heimahjálp var spurningurin, um Nærverkið kundi krevja egingjaldið afturvirkandi. Sambært upplýsingunum í málinum sendi Nærverkið kæraranum rokning fyri egingjald fyri heimahjálp á sumri 2011. Rokningin var fyri tíðarskeiðið februar-juni mánaða 2011. Niðurstøðan hjá nevndini var, at Nærverkið ikki kann krevja egingjald frá kæraranum fyri tíðarskeiðið februar-juni mánaða 2011 grundað á, at ongin heimild var at krevja egingjaldið aftur í tíð.

Nevndin viðmerkti í hesum sambandi, at viðvíkjandi avgerðum, sum leggja byrðar á borgararnar, kunnu hesar sum útgangsstøði bert taka við virknaði aftur í tíð, um greið lógarheimild er fyri hesum. Kravið um heimild er skerpað í mun til slíkar avgerðir, tvs. at har skal vera greið heimild til at taka avgerðina afturvirkandi. Í hesum máli var ikki grundarlag fyri at taka avgerð um gjald fyri heimahjálp aftur í tíð.

## Kommunurnar

| | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|
| **Dagstovnalógin** | | | |
| Staðfest | 3 | | 2 |
| Broytt | 1 | 1 | |
| Heimvíst | 1 | 2 | |
| Burturfallin | 2 | 1 | |
| Avvíst | | 1 | |
| Kærufreist | | | 1 |
| | **7** | **5** | **3** |
| **Barnaverndarlógin** | | | |
| Staðfest | | | 2 |

Tey 3 avgreiddu málini eftir dagstovnalógini vóru um fíggjarligt frípláss á dagstovni.

2 mál vóru eftir barnaverndarlógini. Annað snúði seg um fíggjarligan stuðul til foreldraskeið og hitt um framíhjárætt til barnagarðspláss.

Í einum av málunum staðfesti nevndin avgerð hjá kommunu at nokta frípláss til barn, sum ikki búði í kommununi.
Nevndin viðmerkti, at meginreglan er, at kommunur veita ansingarpláss til børn, sum búgva í kommununi, og hevur kommunan ábyrgdina av virkseminum. Dagstovnalógin heimilar tó, at kommunan kann loyva ansingarpláss til barn, sum ikki er skrásett í kommununi, og í hesum føri hevði kommunan loyvt ansingarpláss í summarfrítíðini til barn, sum búði uttanlands. Kommunan noktaði tó frípláss í hesum sambandi. Kærunevndin í almanna- og heilsumálum staðfesti avgerðina grundað á, at tað er kommunan, har barnið býr, sum eftir lógini um dagstovnar og dagrøkt skal bera útreiðslurnar av fíggjarligum fríplássi, og í hesum føri búði barnið ikki í kommununi.

## Sjúkrahúsverkið

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum avgreiddi 9 mál eftir sjúkrahúslógini í 2012. Av hesum vóru 7 kærumál um ávísing av fylgjara og endurgjald av ferðaútreiðslum í samband við fylgjarar. Hini bæði málini snúðu seg um fysioterapi á sjúkrahúsi og rindan fyri skurðviðgerð á privatum viðgerðarstovni.




4 av málunum vórðu staðfest, 2 vórðu broytt og 3 fullu burtur, tí sjúkrahúsverkið avgjørdi at taka málini upp til nýggja viðgerð, eftir at málið var kært.

Uppskot til broyting av sjúkrahúslógini er lagt fyri løgtingið á vári 2013, og hevur hetta væntandi við sær greiðari ásetingar um ávísing av fylgjarum.

## Heilsutrygd

| | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 2 | | |
| Heimvíst | | 1 | |
| Burturfallin | | | 1 |

Í 2012 varð eitt mál eftir lóg um almenna heilsutrygd kært til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum. Kærarin tók tó kæruna aftur, áðrenn málið var klárt at viðgera, tí Heilsutrygd viðgjørdi umsókn hansara av nýggjum.

## Samskiftið við myndugleikarnar

Samskiftið við myndugleikarnar gongur sum heild væl, og Kærustovnurin hevur ikki nakað at viðmerkja í hesum sambandi.

## Viðgerðartíðin

Í 2012 var miðal viðgerðartíðin hjá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum góðar 4 mánaðir. Hetta er knappan mánaða styttri enn miðal viðgerðartíðin í 2011 og 2010, sum var umleið 5 mánaðar.

Kærustovnurin arbeiðir altíð við at hava so stutta viðgerðartíð sum gjørligt, men roknast kann ikki við, at tað ber til at stytta miðal viðgerðartíðina niður um 4 mánaðir fyri hetta slag av málum, tí atlit skal takast til ummæli og hoyring.

# 7. SKATTA- OG AVGJALDSKÆRUNEVNDIN

## Nevndin

Í Skatta- og avgjaldskærunevndini sita:

- Turið D. Hentze, advokatur og forkvinna
- Rannvá Sólheim, løgfrøðingur
- Kaj Johannesen, cand. merc.
- Pauli Klakkstein, maskinmeistari
- Niclas Joensen, civiløkonomur HD

## Viðgerðarøkið

Skatta- og avgjaldskærunevndin viðger kærur um:

- Avgerðir hjá TAKS um skatt, toll og meirvirðisgjald
- Avgerðir hjá Akstovuni um avgjald við skrásetingargjald á motorakførum

## Móttikin mál

Í 2012 eru 42 kærur latnar Skatta- og avgjaldskærunevndini. Av hesum eru 24 kærur innan skatta-økið, 8 kærur eru innan mvg-øki og 10 kærur viðvíkja øðrum økjum, herundir t.d. rentustuðli, ferðastuðli og líknandi.



Talan er soleiðis um nógv færri innkomnar kærur í 2012 enn í 2011 og 2010, tá ávikavist 77 og 65 kærur komu inn. Kærutalið er eisini nógv lægri enn árini 2009 og 2008, tá ávikavist 161 og 160 kærur komu inn. Men hesi bæði árini vóru heilt serlig grundað á tær nógvu kærurnar um mvg av skrásetingargjaldi, og tí ber ikki til at meta árið 2012 í mun til hesi bæði árini. Verður mett í mun til 2007 og aftur mugu 42 innkomnar kærur metast sum eitt vanligt ár.

Annars kann viðmerkjast, at gongdin, sum hevur verið við økingini av mvg-málum í mun til skattamál og onnur mál, er broytt í 2012, har færri mvg-mál eru innkomin í mun til árini frammanundan.

## Avgreidd mál

Skatta- og avgjaldskærunevndin hevði 11 vanligar fundir í 2012 og harafturat 1 fund at viðgera 1 serligt mál. Tilsamans vóru 72 mál avgreidd í 2012, meðan talið av avgreiddum málum í 2011 og 2010 var ávikavist 62 og 137.




Talið av avgreiddum málum í 2012 er á støði við avgreiddu málini í 2011, men væl lægri enn talið av avgreiddum málum í 2010. Árini 2010 og 2009 var talið av avgreiddum málum tó óvanliga høgt grundað á tær nógvu kærurnar um mvg av skrásetingargjaldi, sum vórðu avgreiddur hesi bæði árini, og tað ber tí ikki til at samanbera við hesi ár. Viðmerkjast kann, at í 2008 vórðu avgreidd 57 mál, og árini áðrenn var talið eisini um 60 mál.

Samanumtikið má talið av avgreiddum málum í 2012 tí metast at vera á vanligum støði, tó eitt sindur í hægra endanum.

## Býtið av avgreiddum málum

Fyri 4-5 árum síðani vóru skattakærurnar flestar í tali, men tey seinastu árini er talið av mvg-kærum hækkað, meðan tali av skattakærum er minkað, og í 2011 var býtið ógvuliga javnt millum hesi økir. Um sæð verður burtur frá avvístum málum, vórðu bara 13 skattakærur viðgjørdar í 2011, og í ársfrágreiðingini fyri 2011 varð viðmerkt, at talið av skattakærum var lægri enn nakrantíð, og at tað fór at vera áhugavert at síggja, um hetta talið fór at blíva við at vera so lágt, ella um vend fór at koma í aftur. Nú eru vit so í 2012, og sum tað framgongur av talvuni, eru skattakærurnar aftur fleiri í 2012, bæði í tali og lutfalli. Hinvegin eru færri mvg-kærur, og hesar eru við at finna aftur á sítt vanliga støði. Býtið er nú meira líkt tí, sum var fyri 4-5 árum síðani og áðrenn tað.




Viðvíkjandi stuðulsøkinum eru tað aftur serliga kærurnar um rentustuðul, sum eru nógvar í tali. TAKS gjørdi eitt átak á hesum øki í 2011 og tók nógvar avgerðir, sum høvdu kærur við sær. Av tí at málini vóru illa upplýst og sjálvstøðug avgerð ikki var tikin til spurningin um afturgjald av rentustuðlinum, vóru lutfalisliga nógv mál heimvíst til nýggja viðgerð. Hetta hevur so aftur havt nýggj kærumál við sær, sum eru avgjørd í 2012.

Annars kann viðmerkjast, at tað ikki sæst í býtinum av kærum, um TAKS hevur gjørt eitt átak innan eitt serligt øki í 2012, eins og undanfarnu tvey árini. Í 2010 gjørdi TAKS átak innan skatting av kapitalvinningi og í 2011 innan rentustuðulsøkið, og sást hetta aftur í býtinum av kærum. Nógvar kærur eru aftur í 2012 innan rentustuðulsøkið, men hetta stendst av eini afturvendan av teimum avgerðum um rentustuðul, sum vórðu heimvístar í 2011.

## Avgreiðslan

Av 72 kærumálum eru 23 kærumál staðfest av nevndini. Flestu kærumál eru sostatt staðfest, og í hesum er eingin broyting í mun til undanfarin ár.

Aftur í ár eru fá mál, sum í síni heild eru heimvíst til nýggja viðgerð hjá tí myndugleika, sum hevur tikið avgerð. Talan er um 5 mál. Í 2011 vóru 6 mál heimvíst.

Viðmerkjst skal tó, at afturat omanfyri 5 málum eru 3 mál staðfest og heimvíst til uppgerð, og 3 mál eru broytt og heimvíst til uppgerð.

Nógv mál vórðu avvíst í 2011 í mun til undanfarin ár, og í 2012 er talið av avvístum málum aftur á vanligum støði.

Lutfalsliga nógv mál eru broytt og partvís broytt í 2012, tó uttan at nøkur serlig orsøk sæst at vera til tað.

Harafturat eru nógv burturfallin mál, og ein orsøk til, at fleiri burturfallin mál eru í 2012 er, at TAKS afturkallaði nøkur mál til viðgerðar, tí TAKS metti avgerðirnar hjá TAKS at vera skeivar ella ivasamar.



### *TAKS*

56 kærur um avgerðir  hjá TAKS eru viðgjørdar. Fleiri mál eru burturfallin í ár í mun til undanfarin ár, men tað, sum er serliga áhugavert, er, at parturin av málum, sum eru ávikavist broytt, partvís broytt ella heimvíst er lutfalsliga stórur í ár. Tað ber tó ikki til at vísa á nakra serliga orsøk til hetta.




### *Kommunala Skattakærunevndin*

15 kærur vóru um avgerðir hjá Kommunalu Skattakærunevndunum í 2012. Um sæð verður burtur frá málum um kærufreist, eru 12 kærur viðgjørdar. Vanliga eru millum 4-6 kærur um avgerðir hjá Kommunalari Skattakærunevnd, so talið av kærum í 2012 má metast at vera høgt.



Tað áhugaverda í ár er, at nógvar broytingar og heimvísingar eru av avgerðunum hjá Kommunalu Skattakærunevndunum. 4 avgerðir eru broyttar, og 2 eru heimvístar og viðmerkjast kann eisini, at tað er Stýrið hjá TAKS, sum hevur kært allar hesar avgerðir.

Viðmerkjast kann eisini í hesum sambandi, at Stýrið hjá TAKS hevur kært íalt 10 avgerðir hjá Kommunalu Skattakærunevndunum í 2012. Ein kæra varð avvíst, tí kærufreistin var farin. Annars vóru sum longu nevnt 4 avgerðir broyttar, 2 heimvístar og 3 staðfestar.

### *Akstovan*

1 kæra var um eina avgerð hjá Akstovuni í 2012. Vanliga eru 4-6 kærur um avgerðir hjá Akstovuni um árið. Í 2011 var tó ongin kæra, og í 2012 var bert ein. Tað ber ikki til at siga, um nøkur serlig orsøk er til hetta.




## Samskiftið við myndugleikarnar

Samskiftið við myndugleikarnar hevur verið gott í 2012.

## Serligar viðmerkingar til myndugleikarnar

Viðvíkjandi málum av serliga stórum týdningi kann upplýsast, at nevndin í 2012 hevur tikið avgerð um at broyta siðvenjuna við roknan av kærufreist. Orsøkin til hetta er óregluliga postgongdin hjá Posta. Roknað verður nú við 5 postdøgum í staðin fyri 3.

Upplýsast kann eisini, at kærunevndin í januar 2012 broytti eina avgerð hjá TAKS um útroknan av fjarstøðu við veitan av stuðli til ferðaútreiðslur sambært løgtingslóg nr. 93 frá 6. juni 1997 um stuðul til ferðaútreiðslur. Kærunevndin tók avgerð um, at heimild ikki er at áseta fjarstøðuna grundað á ásetingarnar í álmanakkanum. Onnur kæra um sama evni varð síðani móttikin í endanum av 2012, sum vísti, at TAKS ikki hevur broytt siðvenjuna, soleiðis at hendan er í tráð við lógina og avgerðina hjá kærunevndini frá januar 2012.

Fleiri kærur hava hetta árið verið frá TAKS um avgerðir hjá Kommunalu Skattakærunevndunum um at loyva uppafturtøku av skattaálíkningum í førum, har grundarlag ikki hevur verið fyri hesum vísandi til ásetingarnar í § 25 a og b í toll- og skattafyrisitingarlógini. Nevndin hevur broytt hesar avgerðir og hevur avgjørt, at reglurnar í toll- og skattafyrisitingarlógini gera sum útgangsstøði endaliga upp við møguleikanum fyri uppafturtøku. Forvæntningsprinsippið kann tó víðka møguleikan fyri uppafturtøku.

Í hesum sambandi skal viðmerkjast, at nevndin í fleiri avgerðum hevur víst á, at tað er mett at vera óheppið, at eingin áseting í § 25b í toll- og skattafyrisitingarlógini loyvir uppafturtøku, um serligar umstøður gera seg galdandi. Í teimum donsku reglunum um uppafturtøku finst hesin møguleiki. At ongin tílík áseting er í § 25 b í lógini um toll- og skattafyrisiting hevur m.a. við sær, at uppafturtøka sum útgangsstøði ikki kann loyvast á serligum grundarlagi, um TAKS hevur gjørt ein feil í sambandi við skattauppgerðina.

Í ársfrágreiðingini fyri 2011 varð víst á, at TAKS í núverandi skattaskipan íroknar B-skatt í skattauppgerðina, sum um hann er goldin, hóast hann ikki er goldin. Hetta hevur við sær ein avlopsskatt ella ein lægri írestandi skatt, sum ikki er reellur, og sum síðani verður mótroknaður aftur.

Í fyrsta lagi førir hetta til nógv óneyðug kærumál, tí borgarin ikki skilir, hvat fer fram. Tað er eisini torført at skilja, hví okkurt verður mótroknað, sum ein ikki skyldar. Ein annar trupulleiki við hesi mannagongd er, at 4%-endurgjald og ein renta verður roknað uppá ein fiktivan avlopsskatt. Hetta gevur ein fyrimun fyri borgaran, tí tann upphæddin, sum skal mótroknast, er størri enn tann B-skattur, sum upprunaliga varð íroknaður skattauppgerðina. Munurin verður so mótroknaður í veruligari skuld. Um talan hinvegin er um ein minni írestandi skatt, verður 4%-gjaldið og rentan, sum borgarin skal rinda, minni, og hetta er aftur til fyrimuns fyri borgaran. Hesir fyrimunir, sum her eru umrøddir, vera latnir borgarunum á ikki-rættarligum grundarlagi.

Hetta er enn ein trupulleiki í 2012. TAKS hevur eisini í brævi upplýst Kærustovnin um, at mannagongdin kemst av núverandi skipan hjá TAKS. Spurnartekin má tó setast við hetta, tí tað er TAKS, sum ger av, hvørjar upplýsingar verða lagdar í skipanina í sambandi við, at ein skattauppgerð verður gjørd. Vart verður tí enn einaferð gjørt við trupulleikarnar á hesum øki.

Í 2011 var eisini viðmerkt viðvíkjandi málum um mótrokning, at ummælini í hesum málum generelt ikki eru nøktandi, og at málini tí eru trupul at viðgera. Í mun til hesi mál er generelt eisini galdandi, at sjálv avgerðin í málinum er ógvuliga illa lýst, og ongin grundgeving er fyri avgerðini, og hendan lýkur tí als ikki treytirnar í fyrisitingarrættinum í mun til hetta. Ongin munandi broyting er á hesum øki í 2012.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin í 2012 var gott 5 mánaðir, og hetta er ein munandi betran í mun til 2011, har miðal viðgerðartíðin var knappar 9 mánaðir.

Málið er at halda miðal viðgerðartíðina á uml. 6 mánaðum. Arbeitt hevur tí verið við at fáa viðgerðartíðina í 2011 niður undir 6 mánaðir aftur, og er hetta eydnast.

Orsøkin til, at viðgerðartíðin var vorðin so long í 2011, var serliga, at neyðugt var at brúka orkuna hjá Kærustovninum at fyrireika mál til aðrar kærunevndir, og møguligt var tí ikki hava regluligar skattafundir í byrjanini av árinum.

Í 2012 hava regluligir fundir verið hildnir alt árið, og hetta hevur stytt miðal viðgerðartíðina, soleiðis at hendan nú er undir 6 mánaðir.

# 8. KÆRUNEVNDIN HJÁ STUDNA

## Nevndin

Í Kærunevndini hjá Studna sita:

- Anna Borg Dahl, løgfrøðingur og forkvinna
- Heðin D. Poulsen, løgfrøðingur
- Bjørg Róin, lestrarvegleiðari

## Viðgerðarøkið

Kærunevndin hjá Studna viðger kærur um avgerðir hjá Studna eftir løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul.

## Móttikin mál

Í 2012 komu 21 nýggjar kærur til Kærunevndina hjá Studna. Hetta er tvífalt talið av kærum árið frammanundan, tá 10 kærur vórðu móttiknar og eisini nógvar fleiri enn í 2010, tá 12 kærur vórðu móttiknar.

16 av kærunum vóru um lestrarstuðul í Føroyum, 4 vóru um ferðastuðul til lesandi uttanlands og 1 um útbúgvingarstuðul uttanfyri norðurlond (ÚSUN).



## Avgreidd mál

Kærunevndin hevði 5 fundir í 2012 og avgreiddi 26 mál. Hetta eru fleiri enn bæði undanfarnu árini, tá ávikavist 8 og 19 mál vórðu avgreidd.




20 av avgreiddu málunum hetta árið snúðu seg um lestrarstuðul í Føroyum, 5 av málunum vóru um ferðastuðul uttanlands og bert 1 snúði seg um ÚSUN.

## Avgreiðslan



8 av kærdu málunum vórðu staðfest, 1 varð broytt, 1 varð heimvíst og 15 fullu burtur. Nevnast kann í hesum sambandi, at heili 14 av kærunum, sum fullu burtur, vóru um verkætlanarstuðul í sambandi við hægri lestur í Føroyum. Talan var um skúlaflokk á hægri lærustovni í Føroyum, sum hevði søkt um verkætlanarstuðul, og tá tey fingu noktandi svar, kærdu tey øll hesar avgerðir. Nevndin tók ikki avgerð í hesum málum, tí eftir at Studni hevði fingið kærurnar til ummælis, avgjørdi Studni at taka málini upp til nýggja viðgerð, og í slíkum førum falla kærurnar burtur.

Í einum máli varð kært um, at Studni noktaði barnastudning til lesandi vísandi til, at sambært skráseting hjá kommunu ella Landsfólkayvirlitinum búði tann lesandi ikki saman við børnunum. Upplýst varð, at foreldrini vóru skild og búðu í hvør sínari kommunu. Børnini búðu helvtina av tíðini hjá mammuni og helvtina av tíðini hjá pápanum. Skrásetingin í Landsfólkayvirlitinum var hjá pápanum, tí kommunan setti hesa treyt fyri at nýta skúla- og dagstovnatilboðini. Kærunevndin avgjørdi at broyta avgerðina hjá Studna og grundaði avgerðina við, at mamman hevði forsyrgjaraskyldu yvir fyri børnunum og búði saman við børnunum og leyk tí treytirnar fyri at fáa barnastudning.

Í øðrum máli varð kært um, at Studni noktaði studning til kærara, sum tók útbúgving uttanfyri Norðurlond, tí útbúgvingin hvørki varð góðkend í Danmark, Noregi ella Svøríki. Nevndin vísti í hesum sambandi á, at lóggávan á hesum økinum sigur, at meginreglan er, at SU-góðkenning krevst, skal Studni veita stuðul til hægri útbúgvingar uttan fyri Føroyar. Studni kann tó veita stuðul til útbúgvingar, sum ikki eru góðkendar av SU, um annað Norðurland hevur góðkent útbúgvingina sum stuðulsheimilaða. Ásetingin leggur upp til, at Studni kannar, um hini Norðurlondini veita stuðul. Men sambært upplýsingunum frá Studna sær tað út til, at tað hevur tikið seg upp ein føst praksis, har Studni bert spyr Noreg og Svøríki og ikki hini Norðurlondini. Nevndin metti, at Studni fær ikki gjørt eina meting á einum nóg væl upplýstum grundarlagi, so leingi stovnurin ikki hevur spurt hini Norðurlondini. Nevndin heimvísti málið til nýggja viðgerð hjá Studna, og vísir tað seg, at ein av lestrarstuðulsstovnunum í Norðurlondum veitir stuðul, eigur málið at verða lagt fyri Ráðgevandi nevndina hjá Studna, og kemur Studni síðani at taka avgerð í málinum, um stuðul skal verða veittur ella ikki.

Annars er at viðmerkja um innihaldið í avgreiddu málunum, at nevndin aftur hetta árið, eins og á hvørjum ári, fær kærur frá lesandi, sum hava fingið noktað ferðastuðul í samband við lesnað uttanlands, tí tey hava søkt ov seint. Freistirnar at søkja um ferðastuðul eru alt eftir, nær lesturin er byrjaður, ávikavist áðrenn vár- ella heystlestrarhálvan endar, og heimild er ikki at gera frávik. Tí verða flestu av hesum avgerðum staðfestar.

Viðmerkjast kann tó í hesum sambandi, at Studni broytti freistina frá 31. juli til 30. juni soleiðis, at hon fyrstu ferð var galdandi fyri umsóknir, sum komu í 2012. Hetta er í sjálvum sær ikki so avgerandi, tí í flestu førum er lestrarárið endað 30. Juni, og er hetta eisini í tráð við ásetingina í § 17, stk. 2 í lóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul, har ásett er, at lestrarhálvurnar eftir hesi lóg eru at skilja sum galdandi frá 1. august til 31. desember og frá 1. januar til 30. juni. Studni hevur tó í sambandi við kærumál greitt frá, at tey vóru lagalig og játtaðu umsóknum um ferðastudning, til tey fóru í summarfrí 13. juli. Hetta er eftir, at freistin er farin, og nevndin metti, at hetta als ikki var í tráð við ta vegleiðing, sum stovnurin sjálvur hevur gjørt um freistina. Nevndin metti tað vera óheimilað og heldur tilvildarlig umsiting av reglunum at leingja freistina, fram til stovnurin fer í summarfrí, og kann hetta hava við sær, at borgarar ikki verða viðgjørdir líka.

Fleiri mál hetta árið snúðu seg annars um treytirnar fyri at fáa hægra studningin vísandi til, at viðkomandi hevði útreiðslur av egnum bústaði.

## Viðgerðartíðin

Í 2012 varð miðal viðgerðartíðin fyri Kærunevndina hjá Studna 2 mánaðir. Hetta er ein ½ mánaða styttri enn miðal viðgerðartíðin í 2011, sum var 2½ mánaða. Henda viðgerðartíð má metast at vera so stutt sum yvirhøvur til ber, tá atlit skal takast til ummælistíð og hoyring.

## Samskiftið við Studna

Samskiftið við Studna hevur gingið væl, og Kærustovnurin hevur ikki nakað at viðmerkja í hesum sambandi.

# 9. KÆRUNEVNDIN Í LENDISMÁLUM

## Nevndin

Í Kærunevndini í lendismálum sita:

- Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna
- Fríður P. Dalsgarð, verkfrøðingur
- Birita Wardum, arkitektur

## Viðgerðarøkið

Kærunevndin í lendismálum viðger kærur um:

- Avgerðir hjá kommununum eftir býarskipanarlógini ella byggisamtykt
- Avgerðir hjá kommununum eftir 1881-lógini um ognartøku
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um matrikulering og sundurbýti
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um tinglýsing
- Avgerðir eftir lógini um eigaraíbúðir

## Móttikin mál

Í 2012 komu 26 nýggjar kærur til Kærunevndina í lendismálum. Í 2011 vórðu 25 kærur móttiknar. Hetta er nakað lægri enn í 2010, tá 34 kærur vórðu móttiknar.

16 av kærunum vóru um byggimál eftir byggisamtykt, 5 av kærunum vóru um matrikulering og sundurbýti, 2 um tinglýsing og 3 kærur vóru um ognartøku. Býtið av innkomnum kærum er soleiðis eins og undanfarin ár, har flestu kærurnar eisini eru um byggimál.



## Avgreidd mál

Kærunevndin í lendismálum hevði hetta árið 11 fundir og avgreiddi 29 mál. Hetta eru nøkur fleiri enn í 2011, tá nevndin avgreiddi 24 mál, men nøkur færri enn í 2010, tá nevndin avgreiddi 34 mál.




Ein lítil broyting er í býtinum millum tey ymisku evnini. Sum sæst eru fleiri mál um ognartøku og matrikulering avgreidd í ár og færri byggimál enn undanfarin ár.

## Málini vórðu avgreidd soleiðis:



Um hugt verður eftir øllum avgreiddu málunum, so eru færri staðfestingar í 2012 enn bæði undanfarnu árini. Parturin av avgerðum, sum eru heimvístar, er nakað hægri enn síðsta ár, meðan ongar avgerðir eru broyttar í 2012. Somuleiðis eru líka nógv mál burturfallin í 2012 sum í 2011.

Um hugt verður eftir ymisku lógarøkjunum, sær býti soleiðis út:

*Kærur um byggimál – 15 íalt:*




Hesi mál fevna um byggimálsviðgerð av ymiskum slag, og kann talan vera um kærur frá byggiharra, tí hann ikki fær tað byggiloyvi, sum hann metir seg hava rætt til, men eisini um kærur frá granna, sum metir, at bygt er t.d. ov høgt ella ov nær. Tað serliga við hesum øki er, at tað ikki einans eru lógir og kunngerðir, sum nevndin skal fyrihalda seg til, men eisini byggisamtyktir, sum eru ymiskar frá øki til øki.

Í 2012 hevur nevndin eins og undanfarnu árini viðgjørt spurningar av ymiskum slagi, so sum bygging av bilhúsi og treytir í byggiloyvi um parkeringsviðurskifti.

*Kærur um matrikulmál – 6 íalt:*




Nevnast kann, at nevndin viðgjørdi kæru um avgerð hjá Umhvørvisstovuni at sýta frábýti av sethúsum í eigaraíbúðir. Umhvørvisstovan hevði grundgivið sýtanina við, at broyting í almennu byggisamtyktini varð framd júst við tí fyri eyga at forða fyri, at sethús í umrødda øki verða sundurbýtt til eigaraíbúðir og orsakað av, at umsóknin er innkomin uml. 5 mánaðir eftir, at broytingin í byggisamtyktini varð góðkend, kann umsóknin ikki gangast á møti.
Kærunevndin í lendismálum heimvísti avgerðina grundað á, at húsini eru bygd uml. 1973, og tá við tveimum sjálvstøðugum íbúðum. Talan er sostatt um eigindóm, sum er grundaður, eftir at lógin um eigaraíbúðir kom í gildi, og eigindómurin er frá byrjan av býttur sundur í tvær sjálvstøðugar íbúðir. Í nýggju viðgerðini skuldi Umhvørvisstovan fyrihalda seg til tær treytir, sum eru ásettar í lógini um eigaraíbúðir og viðgera málið í tráð við hesa lóg.

*Kærur um ognartøkumál – 5 íalt:*




Kærunevndin hevur viðgjørt 5 mál um ognartøku í 2012. 4 mál vórðu avvíst og 1 kæra varð afturkallað. Talan var í hesum føri um mál, sum Kærunevndin í lendismálum ikki hevði heimild at viðgera. Í tí eina førinum var talan um avtalurættarligar spurningar og endurgjaldsspurningar. Í hinum málunum at ognartikið var eftir lóg, har heimildin til at viðgera kæruna ikki er løgd til Kærunevndina í lendismálum.

*Kærur um tinglýsingarmál – 3 íalt:*




Kærunevndin í lendismálum viðgjørdi eitt mál um rætting av eigaraviðurskiftunum í tingbókini, tí eitt gávubræv frá 1980 av misgáum ikki var blivið tinglýst viðvíkjandi einum av fleiri matriklum. Nevndin kom til ta niðurstøðu, at avgerðin um at rætta eigaraviðurskiftini er í lagi og í tráð við gávubrævið. Tí var tað rætt og í tráð við § 34, stk. 1, 1. pkt. í tinglýsingarlógini at gera hesa rætting, tá Umhvørvisstovan gjørdist varug við mistakið.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin í 2012 var 6 mánaðir og 14 dagar. Miðal viðgerðartíðin í 2011 var 6 mánaðir og 1 dagur. Miðal viðgerðartíðin var 6 mánaðir og 7 dagar í 2010. Viðgerðartíðin er sostatt longd við 13 døgum í 2012 í mun til 2011 og við 7 døgum í mun til 2010.

Strembað verður altíð eftir at stytta um viðgerðartíðina, men roknað verður ikki við, at miðal viðgerðartíðin fyri hesa nevnd kemur niður um 6 mánaðir. Ein orsøk er, at tað ofta eru fleiri partar í hesum málum, sum allir skulu hava høvi at gera seg kunnugan við innkomnu upplýsingarnar og koma við viðmerkingum. Tí tekur tað ofta langa tíð at fáa hesi mál lýst.

## Samskiftið við myndugleikarnar

Samskiftið við kommunurnar og Umhvørvisstovuna gongur sum heild væl og er ikki nakað serligt at viðmerkja í hesum sambandi.

# 10. VINNUKÆRUNEVNDIN

## Nevndin

Vinnukærunevndin verður samansett av trimum ella fimm limum, tá hon skal taka støðu til einstøk kærumál, formaðurin ella næstformaðurin og tveir ella fýra limir við serkunnleika á viðkomandi øki.

- Gurið Joensen, løgfrøðingur er forkvinna
- Eyðbjørn Larsen, løgfrøðingur er næstformaður

Limirnir við serkunnleika eru:

- Jón Kragesteen, lærari og serkønur limur viðvíkjandi ferðslulógini
- Palli Mortensen, verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi ferðslulógini
- Ebba Mortensen, kemiverkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi arbeiðsumhvørvislógini
- John Mikkelsen, maskinmeistari og serkønur limur viðvíkjandi arbeiðsumhvørvislógini
- Jóngerð Biskupstø, fysioterapeutur og serkønur limur viðvíkjandi arbeiðsumhvørvislógini
- Róðin Mellemgaard, maskinmeistari og serkønur limur viðvíkjandi arbeiðsumhvørvislógini
- Petur í Króki, sterkstreymsverkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni
- Sigurd Lamhauge, verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni
- Knud Erik Skovby, professari og serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini
- Rannvá Sólheim, cand. jur. og serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini
- Sigurjón Ingvason, cand. jur. og serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini og lóg um postvirksemi
- Una Joensen, cand. oecon. og serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini
- Bergur Hanusson, djóralækni og serkønur limur viðvíkjandi djórasjúkulógini, lóg um djóralæknavirksemi og lóg um hald og innflutning av vandamiklum djórum
- Jákup Mørkøre, verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi matvørulógini
- Jústines Olsen, djóralækni og serkønur limur viðvíkjandi djórasjúkulógini, lóg um djóralæknavirksemi og lóg um hald og innflutning av vandamiklum djórum
- Niels Therkildsen, djóralækni og serkønur limur viðvíkjandi matvørulógini, djórasjúkulógini og lóg um djóralæknavirksemi
- Ole Jürgens, djóralækni og serkønur limur viðvíkjandi matvørulógini, djórasjúkulógini og lóg um djóralæknavirksemi
- Ari Johannesen, cand. merc. og serkønur limur viðvíkjandi alilógini
- Jan Sørensen, cand. scient. og serkønur limur viðvíkjandi alilógini
- Herman Oskarsson, cand. polit. og serkønur limur viðvíkjandi kappingarlógini
- Sigurð Ó. Vang, cand. merc. jur. og serkønur limur viðvíkjandi kappingarlógini
- Boði Haraldson, verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál og lóg um landsvegir
- Katrin Joensen, tekniskur assistentur og landmátingarteknikari og serkønur limur viðvíkjandi lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál og lóg um landsvegir
- Pætur Joensen, verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál og lóg um landsvegir

- Óli Johansen, landmátingarteknikari og serkønur limur viðvíkjandi lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál og lóg um landsvegir
- Hjørdis Gaard, cand. scient. pol. og serkønur limur viðvíkjandi lóg um postvirksemi
- Marja Lamhauge, framleiðsluverkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi lóg um postvirksemi
- Brynleif Poulsen, cand. merc. aud. og serkønur limur viðvíkjandi vinnufelagslógunum, ársroknskaparlógini og grannskoðanarlógini
- Vivi Egholm, cand. merc. aud. og serkønur limur viðvíkjandi vinnufelagslógunum, ársroknskaparlógini og grannskoðanarlógini
- Laila Mortensen, cand. act. og serkønur limur viðvíkjandi lóg um tryggingarvirksemi
- Ole Haugaard Nielsen, aktuar og serkønur limur viðvíkjandi lóg um tryggingarvirksemi
- Anna Borg Dahl, cand. jur. og serkønur limur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum
- Alfred Petersen, advokatur og serkønur limur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum
- Andrias Ziska, cand. jur. og serkønur limur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum
- Jan Mortensen, MSc. Eng. og serkønur limur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum
- Maria á Dul, MAP og serkønur limur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum
- Páll Nielsen, advokatur og serkønur limur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum.

## Viðgerðarøkið

Vinnukærunevndin viðger kærur um:

- avgerðir hjá Akstovuni eftir lóg um ferðslu
- avgerðir hjá Arbeiðseftirlitinum eftir lóg um arbeiðsumhvørvi
- avgerðir hjá Elveitingareftirlitinum eftir lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni
- avgerðir hjá Fjarskiftiseftirlitinum eftir lóg um fjarskifti
- avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eftir lóg um matvørur v.m., lóg um aling av fiski, lóg um djórasjúkur, lóg um djóralæknavirksemi og lóg um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø
- avgerðir hjá Kappingarráðnum eftir lóg um kapping
- avgerðir hjá Landsverk eftir lóg um landsvegir og lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál
- avgerðir hjá Posteftirlitinum eftir lóg um postvirksemi
- avgerðir hjá Skráseting Føroya eftir partafelagslógini, smápartafelagslógini, ársroknskaparlógini, lóg um ávís vinnurekandi virkir, lóg um vinnurekandi grunnar, lóg um vinnu og lóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir
- avgerðir hjá Tryggingareftirlitinum eftir lóg um tryggingarvirksemi
- Harumframt viðger Vinnukærunevndin kærur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum.

## Móttikin mál

Í 2012 eru 20 kærur latnar Vinnukærunevndini. Hetta er á leið sama tal av kærum sum tey bæði undanfarnu árini, tá 21 kærur vórðu móttiknar hvørt árið.

Flestu móttiknu kærurnar hetta árið eru um avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Hesar eru 7 í tali. Harnæst koma kærur um avgerðir hjá Akstovuni, sum eru 6 í tali. 5 kærur komu inn um avgerðir hjá Landsverk og 2 um avgerðir hjá Tryggingareftirlitinum.




## Avgreidd mál

Tiknar vórðu 29 avgerðir í 2012. Hetta eru 3 fleiri enn í 2011 og 11 fleiri enn í 2010.



## Avgreiðslan

Vinnukærunevndin staðfesti 9 av avgerðunum og broytti 3. 8 kærur fullu burtur, 1 varð heimvíst og 6 vórðu avvístar. Harumframt tók nevndin støðu til, um kæra skuldi hava steðgandi virknað í 1 føri. Harafturat var ein avgerð um uppafturtøku av eini avgerð hjá kærunevndini.




### *Akstovan*

Vinnukærunevndin hevur móttikið 6 kærur um avgerðir hjá Akstovuni í 2012, harav 5 eru viðgjørdar og 1 er burturfallin. Allar 5 avgerðir vórðu staðfestar.

1 mál var um inddragan av koyrirætti vegna vantandi koyrievnir. Avgerðin hjá Akstovuni í hesum máli varð staðfest.

1 mál var um umskráseting av einum bili frá vørubili til persónbil, tí Akstovan í sambandi við sýn varð varug við, at akfarið hevði setur aftan. Spurningurin var í fyrsta lagi, um talan var um ein persónbil í tí ítøkiliga førinum, og síðani var spurningurin, um grundarlag var hjá Akstovuni fyri at umgera upprunaligu avgerð sína. Nevndin staðfesti avgerðina hjá Akstovuni um at krevja umskráseting til persónbil.

1 mál var um sýtta nýtslu av ”taxa” ella ”leysur” skelti á einum smábussi, sum varð nýttur til hýruvognskoyring. Nevndin staðfesti avgerðina hjá Akstovuni vísandi til, at núverandi reglugrundarlag ger endaliga upp við, hvørjar lyktir ein bilur kann og skal hava. Tá smábussar hvørki kunnu ella skulu hava tey í málinum umrøddu skelti (lyktir), var grundarlag fyri at staðfesta avgerðina hjá Akstovuni. Spurnartekin kann tó setast við, um reglugrundarlagið er nøktandi viðvíkjandi nýtsluni av sovorðnum lyktum/skeltum.

2 kærumál vóru um umskiftan av nummarplátum til motorsúkklu. Kærararnir ynsktu at umskifta nummarpláturnar við eina minni stødd. Nevndin staðfesti avgerðina hjá Akstovuni at sýta hesum vísandi til reglugrundarlagið og siðvenjuna hjá Akstovuni á økinum.

### *Heilsufrøðiliga Starvsstovan*

Tilsamans 12 av avgerðunum hjá Vinnukærunevndini í 2012 snúðu seg um avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. 2 avgerðir vórðu staðfestar, 2 vórðu broyttar, 6 fullu burtur og í einum máli varð støða tikin til áheitan um at geva kæru steðgandi virknað. Harafturat var eitt mál um uppafturtøku av eini avgerð hjá nevndini.

1 mál var um sýtan at seta út viðgerðarvatn. Nevndin staðfesti avgerðina vísandi til vandan fyri smittu og sjúku.

Í einum máli hevði Heilsufrøðiliga Starvsstovan sýtt, at útsetan av smolti skuldi økjast. Hendan avgerðin varð eisini staðfest. Víst var lúsatrupulleikarnar í økinum og hartil til dálkingina í mun til ávís økir.

Í sama máli loyvdi nevndin eisini steðgandi virknað viðvíkjandi avgerð um at sýta at økja útsetuna av smolti. Víst varð til tær fíggjarligu avleiðingarnar hjá kæraranum, um smoltið ikki bleiv sett út. Hinvegin kundi smoltið takast upp aftur, um avgerðin hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni varð staðfest.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan heitti á Vinnukærunevndina um at taka upp aftur málið um steðgandi virknað til nýggja viðgerð vegna samansetingina av nevndini. Nevndin fann onki grundarlag fyri uppafturtøku.

1 mál var um skráseting av eini kommunu sambært matvørulóggávuni fyri at hava eitt sølutorg. Nevndin broytti her avgerðina hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni vísandi til, at grundarlag ikki er í núverandi lóggávu fyri at krevja, at kommunan skuldi skrásetast.

Í einum máli hevði Heilsufrøðiliga Starvsstovan sýtt fyri innflytan av einum hundi av slagnum Old English Bulldog. Nevndin broytti avgerðina vísandi til, at hundurin ikki varð mettur at vera ein kamphundur.

### *Landsverk*

Seks mál um avgerðir hjá Landsverki vórðu avgreidd í 2012. 5 mál vórðu avvíst; 4 tí talan ikki var um fyrisitingarligar avgerðir, men heldur um hoyringssvar, og 1 varð avvíst, tí Vinnukærunevndin metti tað ikki hoyra til heimildarøkið hjá nevndini. 1 mál um sýtan av byggiloyvi til seyðahús varð heimvíst, tí avgerðin ikki var nøktandi.

Viðvíkjandi lutfalsliga mongu avvístu málunum hetta árið skal viðmerkjast, at tað er eitt lógarfest krav, at kommuna í sambandi við viðgerð av byggiloyvum skal senda Landsverk ein fyrispurning um, hvørt nakað er til hindurs fyri, at kommunan kann geva byggiloyvi. Talan er um lógarkravda hoyring, sum kommunan er áløgd at fylgja. Mett varð, at eitt tílíkt ummæli frá Landsverk er partur av kommunalu byggimálsviðgerðini og eini møguligari kæru um niðurstøðuna hjá kommununi. Soleiðis var talan um hoyringssvar heldur enn fyrisitingarligar avgerðir, og kærast kundi tí ikki til Vinnukærunevndina í hesum førum.

## *Tryggingareftirlitið*

Tvey mál vóru um avgerðir hjá Tryggingareftirlitinum. Eitt mál varð afturkallað og hitt snúði seg um innlit. Her varð kært um, at Tryggingareftirlitið ikki vildi geva innlit í samstarvsavtalu millum Eftirlitið og ein konsulent hjá Eftirlitinum. Talan er sostatt um umbøn um innlit í eitt mál viðvíkjandi sjálvum tí fyrisitingarliga virkseminum hjá Tryggingareftirlitinum í meira generellum høpi og ikki í eitt mál, sum kann kærast til Vinnukærunevndina. Málið varð avvíst, tí mett varð, at hetta ikki kundi kærast til Vinnukærunevndina. Víst varð ístaðin til Vinnumálaráðið.

## *Jarðfeingi*

Ein avgerð var á elveitingarøkinum, og hendan snúði seg um veitan av loyvi til framleiðslu av el burtur úr vindorku. Nevndin staðfesti avgerðina hjá Jarðfeingi vísandi til, at Jarðfeingi hevur hildið tey yvirskipaðu, formligu krøvini í elveitingarlógini, og metingin hjá Jarðfeingi í samband við avgerðina varð mett at vera í lagi.

## *Fjarskiftiseftirlitið*

Ein avgerð hevur verið um kæru á fjarskiftisøkinum, sum m.a. snúði seg um harmonisering av termineringsprísum millum veitarar á teleøkinum. Nevndin hevur áður heimvíst avgerðina hjá Fjarskiftiseftirlitinum um hetta, og hendan viðgerðin var um tað nýggju avgerðina hjá Fjarskiftiseftirlitinum. Nevndin staðfesti avgerðina, bæði í mun til prísstøðið og tillagingartíðarskeiðið.

## *Lógin um setanarprógv*

Vinnukærunevndin viðgjørdi eitt mál innan lógina um setanarprógv. Spurningurin var, um upplýsingarskyldan sambært lógini um setanarprógv var yvirhildin. Vinnukærunevndin gekk kæruni á møti í mun til 117 persónar og ímóti í mun til 8 persónar.

Tvey fakfeløg kærdu vegna 125 limir, at ein arbeiðsgevari hevði ikki hildið sínar skyldur sambært lógini um setanarprógv.

Tá støða verður tikin til, um brot er framt á lógina um setanarprógv, skal metingin gerast í mun til viðurskiftini hjá tí einstaka persóninum. Neyðugt varð tí at fáa til vega upplýsingar um viðurskiftini hjá hvørjum einstakum av hesum 125 persónum. Upplýsingar um viðkomandi hevði arbeitt meira enn 8 tímar í miðal, um viðkomandi hevði arbeitt meira enn 1 mánaða, nær starvssetanin var byrjað, og hvussu leingi viðkomandi hevði arbeitt hjá hesum arbeiðsgevara. Í veruleikanum var talan tí um 125 einstakar metingar og harvið 125 mál.

Í hesum málinum kom greitt fram, at tað er munur á at viðgera mál, har tveir privatir partar eru ósamdir sínamillum, heldur enn at viðgera kæru um avgerð hjá almennum myndugleika. Tað vísti seg millum annað at vera trupult at fáa neyðugu upplýsingarnar til vega, m.a. tí partarnir vóru ikki á einum máli um, hvør av teimum skuldi útvega upplýsingarnar, sum nevndin hevði tørv á.

## Gjald fyri kærur

Vísandi til § 7 í kunngerð nr. 78 frá 28. august 2008 um vinnukærunevnd er gjald ásett fyri viðgerð av ávísum kærum til Vinnukærunevndina. Kostnaðurin fyri kæruviðgerð er settur til kr. 4.000, uttan tá kæran viðvíkur viðurskifti, sum ikki hava samband við tað aktuella ella framtíðar vinnuvirksemið hjá viðkomandi, ið kærir. Í slíkum førum er kostnaðurin kr. 2.000.

Í 2012 er gjald á kr. 4.000 rindað 1 ferð.

## Samskiftið við myndugleikarnar

Sum heild má samstarvið við myndugleikarnar sigast at hava gingið væl, og kærustovnurin hevur fingið tey skjøl og frágreiðingar, sum biðið er um og innan rímiliga tíð.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin fyri øll avgreidd mál hjá Vinnukærunevndini í 2012 var knappar 6 mánaðir. Hetta má metast at vera ein rímilig viðgerðartíð fyri hetta slagi av málum.

## Val av serkønum nevndarlimum

Aftur í ár skal vart gerast við, at á nógvum økjum eru enn bert tveir serkønir limir valdir til Vinnukærunevndina.

Lógin leggur upp til, at formaðurin tilnevnir 2 til 4 serkønar limir at viðgera málini. Men tá tað í flestu førum bert eru valdir tveir serkønir limir á hvørjum øki, er tilnevning formansins meiri formlig enn reell. Mælt verður til, at í minsta lagi 4 serkønir limir verða valdir til økini, eisini við atliti til møguligar gegnistrupulleikar.

# 11. Psykiatriska sjúklingakærunevndin

## Nevndin

Limir í Psykiatrisku sjúklingakærunevndini eru

- Nella Festirstein, løgfrøðingur, formaður í nevndini
- Kaj Kallsberg, fyrrv. kommunulækni
- Sámal Lindenskov, sálarsjúkrarøktari

## Viðgerðarøkið

Kærast kann til Psykiatrisku sjúklingakærunevndina um persónur í samband við innlegging á psykiatrisku deild verður útsettur fyri tvingsil.

## Virksemið í 2012

Í 2012 vóru 11 kærur latnar Psykiatrisku Sjúklingakærunevndini. Hetta eru munandi fleiri enn árini frammanundan, tá ávikavist 3 og 5 kærur vóru móttiknar.

Hvør kæra til Psykiatrisku sjúklingakærunevndina inniheldur ofta kærur um fleiri ymisk tvingsilsinntriv og so var eisini hetta árið. Í teimum 11 kærunum varð kært um tilsamans 22 tvingsilsinntriv, men nevndin tók tó ikki støðu til øll hesi tvingsilsinntrivini, tí 4 av kærunum, har tilsamans varð kært um 13 tvingsilsfyriskipanir, vóru afturkallaðar, áðrenn nevndin hevði viðgjørt tær. Nevndin tók soleiðis støðu til tær 7 kærurnar, sum tilsamans kærdu um 9 tvingsilsinntriv. Staðfestast kann, at talið av afturkallaðum kærum hetta árið er lutfalsliga høgt, men ilt er tó at meta um orsøkina til hetta.

## Kærumálini, sum vórðu avgjørd, vóru av hesum slagi

Kærunevndin hevur hildið 8 fundir í 2012 og tók støðu til 9 tvingsilsinntriv. Kærunevndin avgjørdi at góðkenna øll hesi tvingsilsinntrivini.

| | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|
| • Tvingsilsinnlegging | 3 | 3 | 4 |
| • Tvingsilsfastspenning | 3 | 2 | 1 |
| • Tvingsilsafturhald | 3 | 3 | 2 |
| • Bráðfeingis sissandi heilivág | 1 | 1 | 2 |
| **Í alt** | **10** | **9** | **9** |

Í 2012 er sostatt sama tal av tvingsilsinntrivum viðgjørd og góðkend av kærunevndini sum í 2011, hóast fleiri kærur vóru móttiknar.

## Tvingsilsfyriskipanir á Psykiatriska Deplinum í 2012

Psykiatriski depilin hevur upplýst fyri Føroya Kærustovni, at frá 1. januar til 31. desember 2012 hava 55 tvingsilfyriskipanir verið tilsamans. Sjúklingaráðgevar hava verið tilnevndir 39 ferðir í 2012.

| | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|
| • Tvingsilsinnlegging | 13 | 7 | 12 |
| • Tvingsilsfastspenning | 6 | 9 | 14 |
| • Tvingsilsafturhald | 8 | 11 | 12 |
| • Tvingsilsviðgerð | 4 | 1 | 13 |
| • Verjutiltøk | | | 1 |
| • Persónlig vernd | | | 3 |
| **Í alt** | **31** | **28** | **55** |

Um samanborið verður við 2011 vísa tølini frá Psykiatriska deplinum, at virksemið viðvíkjandi tvingsli er økt munandi. Í 2011 og 2010 vóru ávikavist 28 og 31 tvingsilsfyriskipanir í mun til 55 í 2012.

Virksemið hjá sjúklingaráðgevunum er eisini munandi økt, frá ávikavist 18 og 17 tilnevningar í 2010 og 2011 til 39 tilnevningar í 2012.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin fyri kærurnar hjá Psykiatrisku sjúklingakærunevndini er umleið 10 dagar í 2012.

## Samskiftið við Psykiatriska Depilin

Annars verður framhaldandi latið væl at samskiftinum við Psykiatriska depilin. Uppmøtingarnar til fundirnar hjá kærunevndini hava eisini framhaldandi verið góðar bæði frá starvsfólkunum á Psykiatrisku deild og frá sjúklingaráðgevunum.


Føroya Kunngerðasavn B 1 2002
Føroya Kunngerðasavn B 2
Føroya Kunngerðasavn A
Føroya Kunngerðasavn B
Føroya Kunngerðasavn A
Føroya Kunngerðasavn B
Føroya Kunngerðasavn A
Føroya Kunngerðasavn B
Føroya Kunngerðasavn B
Føroya Kunngerðasavn A
Føroya Kunngerðasavn D
Føroya Kunngerðasavn A

# 12 Skuldarumskipanarnevndin

## Nevndin

Í Skuldarumskipanarnevndini sita:

- Ingi højgaard, advokatur og formaður í nevndini
- Ulla Joensen, cand. merc.
- Súsanna Leo, løgfrøðingur.

## Viðgerðarøkið

Nevndin viðger umsóknir um umskipan av almennari skuld.

## Móttikin mál

Í 2012 komu 28 mál inn til Skuldarumskipanarnevndina. Hetta er fleiri enn í 2011, tá 19 umsóknir vórðu móttiknar, men færri enn í 2010, tá 34 umsóknir kom inn. Talið av umsóknum er sostatt aftur á einum meira vanligum støði eftir serliga lága talið av umsóknum í 2011.

Á talvuni síggjast innkomnu málini uppbýtt eftir skuldarslagi. 8 av umsóknunum vóru um ymiska skuld, 13 um skattaskuld, 4 vóru um rentur, 2 um mvg og 1 um lestrarskuld.



## Avgreidd mál

Skuldarumskipanarnevndin hevði 6 fundir í 2012, og vóru 35 mál avgreidd. Hetta eru fleiri enn bæði undanfarnu árini, tá nevndin avgreiddi ávikavist 18 mál í 2011 og 33 mál í 2010.

Á talvuni síggjast avgreiddu málini uppbýtt eftir skuldarslag.




## Málini vórðu avgreidd soleiðis:



## Eftirgivin skuld:

Skuldarumskipanarnevndin eftirgav í alt umleið kr. 3.135.885,00 í 2012.
Skuldin er uppbýtt soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| • Rentuskuld | uml.kr. | 2.429.743,00 |
| • Vinnu- og veðhaldslán | uml.kr. | 0,00 |
| • Lestrarlán | uml.kr. | 0,00 |
| • Mvg-skuld | uml.kr. | 169.968,00 |
| • Landsskattur | uml.kr. | 536.174,00 |

Tað er torført at seta upp nágreinilig tøl um eftirgevingar, tí ymiskar umstøður gera, at tølini ofta broytast eitt sindur. Rentuskuldin broytist t.d. alla tíðina. Hini tølini kunnu vera broytt eitt sindur, frá tí umsóknin kom inn, til avgerðin varð tikin av nevndini.

Í málunum, har nevndin hevur samtykt ikki at ganga umsóknini á møti, hevur talan í nógvum føri verið um mál, har skuldin er lítil sæð í mun til ogn og inntøku hjá persóninum, ella at umsøkjarin hevur havt frívirði í fastari ogn. Taks hevur eisini í nøkrum førum trygt veð fyri skuldini.

Í 2012 vóru ongar avgerðir tiknar í bólkinum framleiðslugjald, tollur og lønarhæddaravgjald. 2 mál fullu burtur í bólkinum vinnu- og veðhaldslán.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin í 2012 var 8½ mánaðir og er sostatt tann sama sum í 2011.

Staðfestast má, at viðgerðartíðin á hesum øki er long, og strembað verður eftir at stytta um hana.
Spurningurin er tó, hvussu nógv tað ber til at stytta um hana, tí orsøkin til viðgerðartíðina er ikki so einføld, men ein samanseting av fleiri faktorum.

Mannagongdin í hesum málum er tann, at umsóknarblað um eftirgeving verður sent Kærustovninum, og innheintar stovnurin upplýsingar um skuldina frá TAKS ella Studna alt eftir, um talan er um lestrarskuld ella aðra skuld. Er kommunuskattur partur av skuldini, sum søkt verður um eftirgeving fyri, hevur Skuldarumskipanarnevndin ikki heimild at taka støðu til hendan part av skuldini. Heimildin at eftirgeva kommunuskatt liggur hjá kommununum, og áðrenn Skuldarumskipanarnevndin tekur støðu, verður umsóknin send til avvarðandi kommunu til støðutakan av hesum partinum.

Tað kann taka drúgva tíð, áðrenn málið kemur aftur frá kommununum. Í 2012 var viðgerðartíðin hjá kommununum í miðal 5 mánaðir og 22 dagar. Í 2011 var viðgerðartíðin hjá kommununum í miðal 4½ mánaðir, og er hetta sjálvandi við til at leingja um samlaðu viðgerðartíðina. Ummælistíðin hjá Taks var í miðal 3 vikur, og Studni hevði eina miðal viðgerðartíð uppá 32 dagar.

Ein onnur orsøk til longu viðgerðartíðina á hesum økinum er, at tað kann taka drúgva tíð at fáa upplýsingarnar frá umsøkjarunum og í summum førum enda mál, tí umsøkjarin ongantíð kemur

við neyðugu upplýsingunum. Hetta kann tó ikki gerast, fyrr enn hálvt ár er runnið, og umsøkjarin fleiri ferðir er mintur á at koma við hesum upplýsingum.

At enda skal nevnast, at nevndin hevði 6 fundir í 2012. Í 2011 vóru bert 3 fundir. Hetta hevur tó ikki havt nakra ávirkan á samlaðu viðgerðartíðina í 2012 í mun til 2011, møguliga tí at viðgerðartíðin hjá kommununum er longd í miðal við 1 mánaði og 7 døgum.

## Samskiftið við myndugleikarnar

Kærustovnurin hevur havt samskifti við Taks í samband við upplýsingina av málunum, og við Studna, tá talan er um lestrarlán. Mett verður, at hetta samskiftið hevur gingið væl, og er upplýsingartilgongdin komin í eina fasta legu.

Hinvegin tekur tað í so langa tíð hjá Tórshavnar kommunu at taka avgerð um kommunuskattaskuld. Ynskiligt hevði verið, at hesi málini vórðu avgreidd eitt sindur skjótari.

## Viðmerkingar:

Kærustovnurin fer enn einaferð at vísa á, at viðgerðarmannagongdin, sum er neyðug fyri at fylgja ásettu lógarkrøvunum fyri skuldarumskipan, er tung, og virkar nakað stirvin, tá talan er um minni skuld. Mett verður, at skipanin hevði verið meira fleksibul og lættari at umsitið, um t.d. Taks hevði heimild at eftirgivið minni upphæddir, og at gjørt rentufríar gjaldsavtalur av skuld upp til t.d. kr. 50.000,00.

Føroya Kærustovnur er óheftur stovnur undir Innlendismálaráðnum. Stovnurin fyrireikar kærumál til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Skatta- og avgjaldskærunevndina, Kærunevndina hjá Stuðulsstovninum, Kærunevndina í Lendismálum, Vinnukærunevndina og Psykiatrisku Sjúklingakærunevndina. Harumframt er Kærustovnurin skrivstova hjá Skuldarumskipanarnevndini og Fjølmiðlanevndini. Á stovninum starvast í løtuni níggju fólk; stjórin, fýra løgfrøðingar og fýra skrivstovufólk.

**Føroya Kærustovnur | Undir Hornabakka | Postsmoga 45 | 110 Tórshavn**
**Telefon 32 05 85 | Telefax 32 05 90 | www.kaerustovnur.fo**

C4designit.com